**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: ( 00 298 ) 34 33 00 Fax: ( 00 298 ) 37 11 42
T-post: ssh@ssh.fo Heimasíða: www.ssh.fo

HMR
28 APR. 2015

Heilsumálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn

*att. Turið Arge, aðalstjóri*

*Dagfest* 13-04-2015

SS/0227-20150001-18
Okkara tilv. RM/jb

Tygara tilv. & j. nr.

Í skrivi 20. novembur 2013 viðv. skipan av føðideild í Føroyum, avger landsstýrismaðurin, at føðideild framyvir skal verða á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Sjúkrahúsið var tá altíð mannað við minst tveimum kirurgiskum yvirlæknum í senn, ið høvdu ta gomlu útbúgvingina, og tóku sær eisini av føðingum.

Í samband við alsamt trengri fíggjarkarmar hevur leiðslan, fyri at kunna halda seg innanfyri karmarnar, einans havt ein skurðlækna til arbeiðis í senn, í mun til áður, tá teir vóru tveir til arbeiðis í senn.
Sjúkrahúsið hevur heldur ikki ta fakligu serlæknamanning, ið krevst fyri at hava eina eftir nútíðarkrevjandi dygdargóða føðideild.

Út frá áðurnevndu viðurskiftum hevur leiðslan, saman við ljósmøðrunum, eftirmett støðuna, og vilja vit mæla til, at allar føðingar framyvir verða framdar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum.

Tað alt avgerandi í hesum er tó, at tað altíð er ein ljósmóður í vakt á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Havandi í huga ta fjarstøðu, ið er, og ta akutfunktión, ið sjúkrahúsið hevur, kunnu vit verða um ein háls, við tragiskum fylgjum, um ongin ljósmóður er til taks í samband við eina óvæntaða føðing, ið altíð fer at fyrikoma av og á.

Hugsast má eisini um tey praktisku og sosialu viðurskiftir hjá barnakonum/familjum, hvat viðvíkur bústaðarviðurskiftum í sambandi við, at barnakonur helst mugu til Havnar at verða eina tíð áðrenn ætlaða føðing. Talan er ofta um konur, ið eru einsamallar við børnum, tí maðurin er til sjós ella burturi og arbeiðir, og mugu tí atlit takast til, at heimið við eftirverandi børnum virkar sum best.

Við heilsan
Suðuroyar Sjúkrahús

Ronnie Midjord
sjúkrahússtjóri